## Kortleggja russiska olju

Nú skulu tøl setast á ta komandi olju- og gassvinnuna í útnyrðingspartinum av Russlandi.

Tað er tann norska Barentshavsskrivstovan, sum hevur bílagt metingina, sum norska felagið Aquaplan Niva skal gera. Margrethe Alnes á Barentshavsskrivstovuni sigur við tíðindastovuna ANB, at tað hevur stóran týdning fyri tey norsku oljufeløgini at fáa at vita, hvussu umfatandi russiska virksemið er, og hvørjar ætlanir russar hava um framtíðina. Eisini hevur tað áhuga at fáa upplýsingar um, hvørji feløg ætlandi verða við í virkseminum, sigur hon.

Aquaplan Niva skal eisini útvega tøl og metingar um, hvussu nógv russisk olja skal flytast fram við norsku strondini í komandi árum, og hvørjar leiðir tangaskipini fara at sigla.

Frágreiðingin hjá Aquaplan Niva verður ætlandi liðug í februar næsta ár.

## Úr 14 tímum niður í hálvan fimta

Umborð á teimum skipum, sum hava tvær kryvjimaskinur, kryvja hesar allan fiskin og umborð á onkrum skipum, har menninir áður kundu standa og kryvja í einar 14 tímar, klára maskinurnar nú at kryvja allan fiskin í einar 4-5 tímar.

Maskinurnar spara tí manningini nógva tíð - og nógv stríð, serliga tá ið hálini eru stór.

Kryvjimaskinurnar gera eisini, at fiskurin ikki liggur kroystur í pavnunum, men so gott sum verður kruvdur undan og kemur tískil skjótari í ís.

**-vilmund**

# Samstarvið um Havborg hevur riggað væl




*- Feløgini, sum hava samstarvað um umvælingararbeiði umborð á rækjutrolaranum Havborg, eru sterk á hvør sínum øki, og saman er føroyska útboðið kappingarført við umheimin, sigur Frithleif Olsen, leiðari á FJM*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Frithleif Olsen, leiðari á FJM, sigur, at samstarv millum feløg er einasti møguleiki at lyfta stórar uppgávur í kapping við útbjóðarar uttanlands. - Finna feløg við ymiskum førleika og útboði saman um slíkar uppgávur, er eingin orsøk til at smæðast burtur, heldur hann**

UMVÆLING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Rækjutrolarin, Havborg, sum leirvíkingar eiga, sær nú út sum nýggjur aftur. Ein stórur partur av verksmiðjuni brendi, meðan skipið lá í Noregi um mánaðarskiftið juli/august. Skipið sigldi tó til Føroya við egnari hjálp, og síðan hevur verið arbeitt við at umvæla verksmiðjuna og annað, sum fekk skaða undir eldsbrunanum.

### Í samstarvi

Arbeiðið, sum gjørt er umborð á Havborg, er eitt prógv um, at nógv kann fáast frá hondini upp á lutfalsliga stutta tíð - og í kapping við sama fyritakssemi í grannalondunum, tá ið føroyskar fyritøkur samstarva.

Tað er maskinverkstaðurin FJM í Runavík, sum hevur staðið fyri at byggja verksmiðjuna uppaftur, og felagið hevur havt KJ-Hydraulik á Kambsdali sum undirveitara.

Aðrir veitarar hava verið El-Service, sum hevur tikið sær av el-arbeiðnum og Byggiservice, sum hevur tikið sær av apeteringsarbeiðnum.

Frithleif Olsen, leiðari á FJM, sigur, at teir í fyrsta lagi tóku alla verksmiðjuna – bæði brent og ikki brent – í land, áðrenn teir kundu byrja at byggja verksmiðjuna uppaftur.

Hann sigur, at alt frá lastalúkuni og aftureftir er nýtt á verksmiðjuni – og nógv frameftir eisini.



*Ein stórur partur av verksmiðjuni umborð á Havborg brendi, tá ið eldur kom í skipið, meðan tað lá í Noregi. Nú er umvælingararbeiðið liðugt, og verksmiðjan er sum nýggj*

*Mynd: FJM*

### Stórarbeiði

- Allar el-instalatiónir á verksmiðjuni eru lagdar av nýggjum, og aðrar el-instalatiónir eru eisini eftirhugdar og lagdar av nýggjum. Ein partur av nautisku útgerðini er skift, og annað er eftirhugt, og ein partur av apeteringini er eisini gjørd av nýggjum. Spøl og annar útbúnaður er eisini kannað.

Frithleif sigur, at tað, sum kundi brúkast aftur á verksmiðjuni, er brúkt aftur, men hetta er tann minsti parturin, tí bond og annað er partvís úr plasti og var illa viðfarið av eldi og hita.

- Ein partur av tí rustfría er tó brúkt aftur, leggur hann aftrat.

Leiðarin á FJM sigur, at nú umvælingarnar eru lidnar, er verksmiðjan umborð á Havborg sum nýggj.

### Gingið væl

Frithleif Olsen sigur, at samstarvið millum tryggingina, reiðarí og tey feløg, sum hava arbeitt umborð á skipinum, hevur gingið ógvuliga væl.

Hann heldur, at hetta er ein góður máti at loysa uppgávurnar upp á.

- Vit samstarvaðu eisini um umvælingararbeiði umborð á Suðringi og Stelki, tá ið teir brendu við bryggju her í økinum, og eisini tá vísti tað seg at rigga væl.

Hann heldur, at hetta er einasti møguleiki at lyfta stórar uppgávur í kapping við útbjóðarar uttanlands.

- Finna feløg við ymiskum førleika og útboði saman um slíkar uppgávur, er eingin orsøk til at smæðast burtur.

Frithleif Olsen sigur, at feløgini, sum hava samstarvað um umvælingararbeiði umborð á Havborg, eru sterk á hvør sínum øki, og saman er føroyska útboðið kappingarført við umheimin.